

Fólk frá Føroya Tele hava verið í Suðurkorea og sett upp útgerð á nýggjum oljuskipi og oljupalli

# Føroya Tele partur av risastórari oljuútbygging

Deil:

**Jan Müller**

01.12.2014 - 12:08

Oljan.fo

Stórar oljuútbyggingar fara í hesum døgum fram skamt frá føroyska markinum, vestan fyri Hetland. Føroyska fyritøkan Føroya Tele/FT Net hevur eisini ein leiklut í hesum útbyggingum. Síðani Shefa 2 kaðalin gjørdist veruleiki, hevur Føroya Tele verið úti um seg og gjørt sáttmálar við eitt nú eitt av heimsins størstu oljufeløgum, BP, sum hevur knýtt fleiri av sínum oljuinstallatiónum í samskiftiskaðalin.

Nú BP er við at skifta út stóra framleiðsluskipið á Schiehallion-leiðini og byggir eitt spildurnýtt og nógv størri skip (FPSO) í Korea og er við at byggja ein pall til nýggju oljuleiðina Clair Ridge, er Føroya Tele eisini við í hesum arbeiðinum.

Nú um dagarnar komu tvey av starvsfólkunum hjá FT Net heimaftur úr Suðurkorea. Tað eru Tórur Jørgensen og Einar Vang frá transmissióndeildini, sum hava verið Suðurkorea fyri at seta upp transmissiónsútgerð í tær báðar nýggju framleiðslueindirnar hjá BP.

BP ger í løtuni stórar tillagingar og útbyggingar á teimum stóru feltunum Clair og Schiehallion, sum liggja vestan fyri Hetland, og sum í dag fáa teirra telesamband yvir Shefa kaðalin.

Á Clair feltinum skal nú ein nýggjur pallur uppsetast afturat tí gamla Clair pallinum. Nýggi pallurin fær navnið Clair Ridge, og hesin pallurin verður eisini bygdur á Ulsan skipasmiðjuni í Suðurkorea.

Eisini verður eitt nýtt framleiðsluskip bygt á somu skipasmiðju, sum skal liggja á Schiehallion feltinum, ístaðin fyri tað gamla Schiehallion FPSO skipið, sum verður tikið burtur.

Nýggja risastóra FPSO skipið eitur Glen Lyon.

Einar og Tórur hava undir arbeiðinum í Suðurkorea sett upp útgerðina í framleiðslueindirnar, sum tá tær eru lidnar, verða sleipaðar til feltini vestan fyri Hetland.

Tað er sera umráðandi, at nýggju eindirnar hava eitt vælvirkandi telesamband við BP-høvuðsstøðina í landi, og eindirnar verða, tá tær eru komnar upp á pláss, settar til at fáa teirra samband yvir Shefa kaðalin.

BP ætlar, at nýggju framleiðslueindirnar verða tiknar í nýtslu fyrru helvt av 2016. Hetta er nakað seinni enn upprunaliga ætlað. Føroya Tele arbeiðir so eisini fyri oljufeløg í danska partinum av Norðsjónum.








